


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 02 - 2013

# Frálandavinnan - betri útlit hjá veitingarskipum

Eftir ein heldur víkjandi marknað ber tað nú ímóti betri tíðum fyri veitingarskip hjá oljuvinnuni í Norðsjónum. Tað skrivar norska reiðaríið Eidesvik Offshore í einari frágreiðing. Nevnt verður, at Solstad Offshore hevur skrivað undir ein sáttmála við Statoil um at leiga akkersskipið "Normand Ferking". Talan er um ein trý ára sáttmála, sum kann leingjast við upp til trimum árum. Eitt annað frálandareiðarí, Havila Shipping ASA, hevur skrivað undir tveir nýggjar sáttmálar við Statoil um akkersskipini "Havila Mars" og "Havila Mercury". Lagt verður afturat, at síðani á nýggjárinum hevur Havila Shipping fingið fýra nýggjar sáttmálar fyri knappar 1,5 milliard krónur. Eidesvik Offshore skrivar í frágreiðingini, at við einum oljuprísi oman fyri 100 dollarar fyri tunnuna og einum stórum leiti- og framleiðsluvirksemi eru framtíðarútlitini hjá veitingarskipum í Norðsjónum góð. Eisini føroyingar eru við í frálandavinnuni. Umframt at manna fleiri av útlendsku frálandaskipunum eru eisini føroysk reiðarí sera virkin í altjóða frálandavinnuni. Hesi eru Thor og Skansi Offshore. Og skjótt fær Krúnborg Offshore eisini eitt frálandaskip.